**Landsstýrisins veðbrævaformáli C:**

1)
Gjaldingar eftir hesum veðbrævi skulu vera rindaðar postfrælst á bústaði kravánarans, sum tilskilaður er á síðu 1, ella á øðrum staði í landinum, sum kravánarin ger skuldaran kunnugan við.

2)
Rættstundisligar eru allar gjaldingar ikki seinni enn sjeynda dagin eftir gjaldkomudag, við terminsgjaldingar fyrsta gjaldkomudag. Er gjaldkomudagurin ella síðsti stundisligi gjalddagur, halgidagur, leygardagur, ólavsøkudagur ella grundlógardagur, verður freistað til gerandisdagin eftir. Á sama hátt flytist lokadagurin við allar freistir eftir hesum veðbrævi. Tá ið gjaldingin, áðrenn nevnda freist er úti, er hjá Postverki Føroya til flytingar á gjaldstaðin, er hon rættstundislig.

3)
Skuldarin hevur skyldu at boða kravánaranum frá bústaðarskifti. Hesa fráboðan ber ikki til at skriva á gjaldingarblað, tá ið tað stendur á slíkum oyðublaði, at tað er ikki ætlað til tílíka fráboðan. Ákrav frá kravánaranum, so eisini uppsøgn, kann vera sent skuldaranum ella sett fram á seinasta kunnuga bústaði hansara, um enn bústaðarskifti hevur verið, uttan so at kravánarin kennir nýggja bústað skuldarans. Verður kravánarin varur við, at uppsøgnin av bústaðarskiftinum er ikki komin fram til skuldaran, skal hann siga skuldaranum frá uppsøgnini, um nýggi bústaður skuldarans er til skjals á fólkayvirlitinum ella fæst lagaliga á annan hátt.

4)
Skuldarin váttar, at eingin hevur nøkur rættindi yvir veðnum, tað verið seg veðbræv, keypssáttmáli, leigusáttmáli ella annað, ið forðar veðrættarstøðuni sambært hesum veðbrævi.

5)
Skuldarin bindur seg til, at hava veðið fullvæl brunatryggjað.

6)
Kravánarin hevur veðrætt fyri kravi sínum eftir veðbrævinum um, at goldin verða høvuðsstólur, renta og javnlík gjøld umframt dragurenta. Kravánarin hevur somuleiðis veðrætt fyri útreiðslu, sum hann av góðum grundum hevur havt av uppsøgn, og innheintan, og tá ið hann skuldi røkja síni áhugamál, um onnur gjørdu rættarstig vend móti sama veði.

7)
Tó at veðbrævið er ikki uppsigandi ella uppsagnarfreistin ikki úti, er kravánaranum kortini loyvt at krevja áogn sína innloysta, tá ið soleiðis er:

a) at renta ella avdráttur eru ikki goldin seinasta rætta gjalddag í seinasta lagi. Liggur tó tann treyt við, verður innloysing kravd, at skuldarin hevur ikki goldið rentu og avdrátt í seinasta lagi 7 dagar eftir, at skrivligt ákrav um hetta er framsett ella sent. Hetta ákrav kravánarans skal vera givið eftir síðsta rætta gjalddag og skal staðiliga vera tilskilað, at peningahæddin kann vera kravd innloyst, um renta og avdráttir ikki verða goldin, áðrenn freistin er úti sbr. í hesum sambandi regl. 2, seinasta pkt.
b) at veðið minkar munandi í virði ella verður vanrøkt, og fullgóð trygd verður ikki veitt, tó kravd.
c) at skuldarin noktar kravánaranum ella fulltrúa hansara atgongu til at skoða veðið.
d) at skuldarin ikki, tá ið tað verður kravt sannar, at veðið er fullvæl brunatryggjað, og
e) at veðið ella fyri veðtrygdina munandi partar vera avhendaðir til 3. mann ella seldir á tvingsilssølu.